# Ísland helst í ES í 2013

Eydnast tað íslendsku stjórnini at fáa eitt so mikið gott úrslit burtur úr samráðingunum við ES, at tað fær meiriluta á fólkaatkvøðuni, er tað mest sannlíka, at íslendskur limaskapur í ES verður veruleiki í 2013. Tað sigur formaðurin í uttanríkisnevndini hjá Altinginum, Árni Þór Sigurðsson, við tíðindastovuna Reuters. Sambært formanninum verður gondin í málinum hendan: 16. juli samtykkir Altingið at søkja um samráðingar, 27. juli verður umsóknin løgd fram, í februar í 2010 byrja samráðingarnar, og um ársskiftið 2011-2012 taka íslendingar støðu á fólkaatkvøðu. Er svarið ja, verður limaskapurin veruleiki í 2013.



# Dýrt at vera dani

Av teimum 27 ES-londunum er Danmark tað dýrasta landið at búgva í. Aftan á Danmark koma Noreg, Sveis, Írland, Finnland, Ísland, Luksenburg, Svøríki, Frakland, Belgia og Italia. Tøl hjá Eurostat vísa, at í 2008 vóru prísirnir í Danmark 41 prosent oman fyri meðalprísirnar í øllum ES-londunum. Tað bíligasta landið at búgva í er Bulgaria, har prísirnir vóru 49 prosent niðan fyri meðalprísirnar. Eurostat hevur kannað prísirnar á 2.500 vørum og ymsum øðrum í øllum teimum 37 evropeisku londunum, og her er Makedonia tað bíligasta landið at búgva í við prísum, sum eru heili 53 prosent undir meðalprísunum í ES.

# Livandi bøkur á G!

**Á G! ber til hjá fólki at læna eina livandi bók. Altso ein persón, sum tú ikki vanliga kemur í prát við í gerandisdegnum**




**FESTIVALUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er Føroya Ungdómsráð (FUR), ið skipar fyri Livandi Bókasavninum. Á Facebook skrivar FUR soleiðis um hugskotið handan Livandi Bókasavnið: "Øll menniskju kunnu síggjast sum spennandi bøkur. Vit hava øll hvør okkara royndir, upplivingar, hugsanir, kyn, religión, áskoðanir og mangt annað. Men vit hava eisini øll okkara fordómar, og fordómar kunnu ofta elva til diskriminatión; tað er hetta, Livandi Bókasavn arbeiðir ímóti."

Hugskotið við Livandi Bókasavninum er at bjóða fordómum, stereotypum og tvørskygni av, við at geva fólki møguleikan at læna eina livandi bók, t.e ein persón, ið tey annars ikki koma í prát við í gerandisdegnum. Endamálið er at skapa persónligar relatiónir millum fólk og fáa prát í lag teirra millum, og á henda hátt vera við til at niðurbróta møguliga diskrimination í samfelagnum.

Á Livandi Bókasavninum fert tú m.a at kunna læna hesar bøkurnar: Hin Bahái trúgvandi, Hin Kristni, Muslimurin, Ateisturin, Grønlendingurin, Sri Lanka búgvin (útlendingurin í Føroyum), Hin Samkyndi, Hin Biseksuelli, Feministurin og Fyrrverandi Rúsdrekkamisnýtarin.

Tey, ið luttaka sum bøkur á Livandi Bókasavninum, fáa høvi at deila út av sínari vitan, og tey, sum læna bøkurnar, fáa høvi at økja um sína vitan um umheimin, minnilutabólkar og ymiskar øðrvísi hugsanir.

# Hotel álopin

**Útlendingar vóru millum offrini fyri bumbuspreinging á hotelli í Jakarta í Indonesia. Manchester United skuldi spæla dyst har mánadagin, men hevur nú avlýst**

**BUMBUSPREINGING**
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í minsta lagi níggju fólk hava mist lívið í einari bumbuspreinging á tveimum hotellum í høvuðsstaðnum í Indonesia, Jakarta.

Eitt bumbulið hjá løgregluni hevur funnið eina ósprongda bumbu á Marriott hotellinum í Jakarta. Saman við einum øðrum luskushotelli í býnum var Marriott rakt av bumbuspreinging í morgun í einum samansjóaðum terrorálopi, sum drap minst níggju og særdi 40.

Bumban varð funnin á einum hotelrúmi, tá løgreglan leitaði gjøgnum bygningin eftir spreingingina, sum hendi í kjallaranum.

Bumban varð funnin í rúmi 1808 og hildið verður, at hetta rúmið var miðdepilin fyri álopunum.

Løgreglan hevur enn einki sagt um, hvønn teir halda hevur ábyrgdina av álopinum, og eingin hevur heldur enn tikið ábyrgd fyri bumbubrestunum.

## Avlýsa

Manchester United, sum í løtuni er á venjingarlegu í Asia, kom til Kuala Lumpur í dag, og skal í morgin spæla ein dyst móti einum útvaldum malaysiskum liði. Ætlanin var, at teir mánadagin skuldu spæla dyst móti einum Indonesia All Star liði, men eftir bumbuspreingingina hevur Sir Alex Ferguson gjørt av at avlýsa túrin til Indonesia.



*Sir Alex Ferguson boðaði frá, at dysturin móti Indonesia All Star er avlýstur eftir bumbuspreingingina í Jakarta*

Meiningin var, at United-ferðalagið skuldi búgva á Ritz-Carlton í fýra nætur.

Við á ferðini eru millum aðrar nýggti leikarin Michael Owen, Wayne Rooney, Rio Ferdinand, Paul Scholes og Ryan Giggs.

Nú sleppa indonesar so ikki at síggja stóru ensku stjørnurnar. Tað skrivar heimasíðan hjá BBC.

STARVSLÝSING

Arkitektur ella verkfrøðingur til bygningadeildina á Landsverki

Hevur tú altíð droymt um at byggja?
So fært tú nú møguleikan at royna hetta í verki. Hevur tú hug at arbeiða við nýbygging, umbygging og viðlíkahaldi av almennum bygningum, so kunnu vit bjóða tær øðrvísi royndir í einum spennandi og avbjóðandi starvi á bygningadeildini á Landsverki.
Vit leita í løtuni eftir einum virkisfýsnum og skapandi persóni við byggikønari bakgrund at byrja hjá okkum skjótast til ber.

Arbeiðsuppgávur
Saman við einum toymi og starvsfeløgum við drúgvum royndum fært tú ábyrgdina av:
- prosjektering
- tekniuppgávum
- fakeftirliti
- greining og raðfesting av krøvum til viðlíkahald og bygging av almennum bygningum við atliti at funktionaliteti, estetikki og góðskustøði
- góðkenning av verkætlanum og støðutakan til møguligar broytingar
- viðgerð av øðrum málum, har bygging og bygningar, landslag og formlist eru partar av viðgerðini.

Førleikakrøv
Vit leita eftir fólki við byggikønari bakgrund – t.e. við útbúgving sum arkitektur ella verkfrøðingur. Tað er ein treyt, at tú hevur royndir við tekning í Autocad ella Microstation.

Vit vilja røkka best møguligum úrslitum, og vænta vit tí, at tú ert arbeiðssamur, dugnaligur og væl skipaður.

Vit leggja stóran dent á góðar persónligar eginleikar, at tú arbeiðir sjálvstøðugt, ert ein arbeiðsglaður viðleikari við góðum samstarvsevnum og gevur títt íkast til menning av arbeiðsplássinum.

Setanarviðurskifti
Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til lv@lv.fo ella:

Landsverk
Postboks 78
110 Tórshavn

og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 24. juli 2009, kl. 12.00. Merkið umsóknina „Umsókn til bygningadeildina". Vinarliga viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Ewald Kjølbro, leiðara á bygningadeildini, á tlf. 540 861 ella ek@lv.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo
LANDSVERK byggir land

Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herundir tyrlupallar.